# Havstovan søkir eftir biologassistentum/hjálparfólkum



## Tvey størv sum biologassistentur/hjálparfólk til Botnfiskadeildina á Havstovuni eru leys at søkja

**Nærri upplýsingar** um størvini kunnu fáast við at venda sær til Petur Steingrund, deildarleiðara, teldupost peturs@hav.fo ella Eilif Gaard, stjóra, teldupost eilifg@hav.fo, tlf. 35 39 00.

Viðkomandi skulu vera við í dagliga arbeiðinum á Botnfiskadeildini, ið m.a. fevnir um at:

– Aldursgreina fisk og føra dáta á teldu.
– Fara við Jákup Sverra ella øðrum skipum at gera kanningar.
– Gera lívfrøðiligar kanningar av fiski.
– Annað fyrifallandi arbeiði.

Umsøkjarar við áhuga fyri havlívfrøði og kunnleika til føroyskan fiskiskap hava fyrimun. Góð evni at samstarva er ein fortreyt.

### Setanartreytir

Talan er um eitt fast starv og eitt fyribils starv. Størvini eru lønt sambært sáttmála millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið.

### Umsóknir

Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum skulu vera Havstovuni í hendi í seinasta lagi 14. november 2021.

Umsóknirnar skulu sendast til:

**Havstovan, Nóatún 1, P.O. Box 3051, FO-110 Tórshavn**
**ella teldupost: starv@hav.fo**

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo